

# Ingi Samulesen fer í útvarpið

Ingi Samuelsen, journalistur, fer komandi tríggjar mánaðirnar at starvast á tíðindadeildini í útvarpinum hjá Kringvarpinum.

Ingi Samuelsen hevur fyrr starvast í útvarpinum. Hann er útbúgvin frá Danmarks Journalisthøjskole í 1990, hann hevur starvast á donskum blað, og hann var blaðstjóri á Dimmalætting í fimm ár frá 2002 til 2007.

Hann starvaðist eisini á Dimmu, áðrenn hann fór undir journalistútbúgvingina



# Brúktu 100 milliónir til at fella Løkke

Donsku vinstraflokkarnir og fakrørslan brúktu í 2010 slakar 100 milliónir krónur til lýsingarherferðir móti sitandi donsku stjórnini og danska forsætisráðharranum. Hetta er fimm ferðir meira enn undanfarna ár.

Ein uppgerð hjá Gallup vísir, at fakfeløgini og vinstraflokkarnir brúktu ikki færri enn 99.573.599 krónur til lýsingarherferðir móti donsku stjórnini í fjør.

*Kelda business.dk/bl.fo*



STREYMUR

***asdaUm doluptatie tie do delit lor irilisl ea faciduis atue magnim vero digniam aci blamcon sectem niamcon sendre feu feugait praeseq***

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# El-framleiðslan fall eitt vet í januar

**EL-FRAMLEIÐSLA Vatnorkan gjørdi góðan mun í januar**

**Eirikur Lindenskov**

El-framleiðslan hjá SEV í ársins fyrsta mánaði fall eitt vet.

Sambært uppgerð frá framleiðsludeildini hjá SEV fall elframleiðslan í januar 0,6% í mun til sama mánaða í fjør.

Framleiðslan í meginøkinum stóð mestsum í stað, meðan framleiðslan í Suðuroy fall 4,7%

Men vatnorkan vaks. Framleiddir vóru tilsamans 25,1 GWt ímóti 25,2 GWt fyrsta mánaðin í fjør.

Framleiðslan úr varandi orku vaks við 4,5% - úr góðum 33% til sløk 38%. Av hesum stóð vatnorkan fyri 31% ímóti 26,5% í januar í fjør.



*Verkamaðurin fær ikki eitt betri lív, fyri tað um Gerhard Lognberg – sum eigur at standa fyri frælsi, javnaði og brøðralag – tekur starvslønarjáttanina frá listafólkunum.*

*Oddfríður Marni Rasmussen*

# Misti koyrikortið

## og misti koyrikortið

Ein maður fekk í dag frádømt koyrikortið í hálvt ár fyri fyrilitsleysa koyring, tá hann yvirhálaði ein bil við ein gonguteig, har ein kona skuldi yvur um vegin við barnavogni.

Hendingin fór fram í apríl í ár, tá maðurin kom koyrandi eftir Hoyvíksvegnum norðureftir. Hann yvirhálar ein bil, sum var steðgaður við ein gonguteig. Maðurin, sum yvirhálar, varnast ikki, at ein kona er á veg út á gonguteigin í vinstru síðu.

Maðurin játtaði seg sekan í fyrilitsleysari koyring.

Ákærin mælti til, at maðurin fekk eina bót upp á 1500 krónur og skuldi haraftrat missa koyrikortið í hálvt ár. Orsøkin til, at hann skuldi missa koyrikortið var, at hann hevði ein annan ferðsludóm frá mars 2008, har hann hevði fingið treytaða frádøming av koyrikortinum fyri ov nógva ferð.

Ein av treytunum var, at hann ikki mátti bróta ferðslulógina næstu trý árini, og tá hendan royndartíð ikki var av, misti maðurin koyrikortið í hálvt ár.

Maðurin tók við dóminum.




BILASØLA

***Toyota hevur so mangan verið mest seldi bilur í Føroyum. Soleiðis var eisini í fjør***

# Selt færri akfør í januar

**BILASØLA Sølan av nýggjum bilum í januarmánaði í ár minkaði við 13 í mun til í fjør**

**Navn Eftirnavn**

Tað eru nógv færri nýggir bilar, nýggjar motorsúkklur og nýggj prutl skrásett í januar í ár, enn tað vóru í januar í fjør.

Tað vísir ein uppgerð hjá Akstovuni yvir akfarssøluna

Tølini vísa, at í Januar í ár vórðu 66 nýggj akfør skrásett afturímóti 79 bilum í januar í fjør.

Sum vera mann, verða nógv flest persónbilar seldir og í januar í ár eru 41 nýggir persónbilar skrásettir aftur ímóti 58 nýggjum persónbilum í januar í fjør.

Annars eru 16 prutl seld í januar í ár, aftur ímóti 10 prutlum í januar í fjør.

Sostatt er eisini skilligt, at tað er lítið og onki selt av øðrum bilum, lastbilum, hýruvognum og øðrum

